# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# SØGULIG SEMJA FYRI SKEYTI

So hendi tað, at nógva og drúgva arbeiðið við nýggjari stjórnarskipan fór fyri skeyti. Alt bendir á, at málið nú hevur fingið endaliga mønustingin, nú løgtingið samtykti at koyra málið aftur í nevnd – og harvið verður tað súltað og fellir burtur, tá tingsetan endar fyrsta dagin.

Hans Pauli Strøm boðaði frá í útvarpinum í gjár, at hann ikki ætlar at brúka fleiri kreftir og tíð til stjórnarskipanaruppskotið. Men hann læt tó dyrnar standa á gloppi soleiðis, at Høgni Hoydal og Jákup Mikkelsen fáa ein kjans at vísa, hvussu tann semjan kann finnast, sum tað ikki hevur borið til at funnið higartil. Tað er tó lítið sannlíkt, at teir megna hetta, men teir skulu sjálvandi sleppa at standa sína roynd.

Hinvegin hava gomlu loysingarflokkarnir, Tjóðveldi og Fólkaflokkurin víst, at teirra vilji til at finna eina pragmatiska loysn er ógvuliga lítil. Tó síggja vit tríggjar mans vísa dirvi: Sjúrður Skaale úr Tjóðveldi, sum hevur argumenterað sera væl fyri sínum sjónarmiðum, Bjarna Djurholm úr Fólkaflokkinum og so Poul Michelsen, fyrrverandi fólkafloksmann, sum nú er í Framsókn. Tað er stórt spell, at teir ikki hava vunnið ljóð fyri sínum sjónarmiðum millum floksfelagar, so vit kundu komið víðari við hesum málinum.

Alt ella einki politikkurin hjá Tjóðveldinum í stjórnarmálum førir onga leið, og við hesum politikki fer flokkurin framhaldandi at ganga sína oyðimarkargongd við loysingarsjónarmiðum, sum flokkurin helst ongantíð vinnur ljóð fyri millum føroyingar, sum ikki ynskja at loysa frá ríkinum.

Vit kundu kanska freistast til at biða um at fáa hasa fólkaatkvøðuna beinanvegin, so vit fáa loysingarspurningin avgreiddan eina ferð med alla. Men tað er heldur eingin loysn, tí vit fáa valla heldur semju um, hvussu vit skulu spyrja. Loysingarfólk vilja heldur halda seg til eina demokratiskt sera ivasama fólkaatkvøðu í 1946, sum var fyri loysing, enn at fáa eina fólkaatkvøðu nú, sum er ímóti loysing.



Tað besta fyri føroyska samfelagið hevði verið, at okkara kosnu menn og kvinnur komu til eina semju í stjórnarmálinum, so kreftirnar ikki vórðu brúktar meira til fjant og fjas um hetta mál, sum onga leið førir.

– Tá tit ikki vilja loysa hetta málið, so latið tað heldur liggja og farið til arbeiðis við onkrum skilabetri.

Men harra Høgni Hoydal og Jákup Mikkelsen, vísið nú, um stirðil er í tykkum: Tí um tit ikki loysa málið nú, so fara tit at rópa út í tóman heim restina av politisku ævi tykkara!

**»Alt-ella-einki-politikkur« førir onga leið...**

## Fimm menn og fimm kvinnur á javnaðarlista

Mánakvøldið hevði Suðurstreymoyar Javnaðarfelag annan uppstillingarfund, og á listan komu seks menn og fimm kvinnur. Síðani fundin hevur Levi Mørk, býráðslimur í Havn, tikið seg av listanum, tí tað sampakkar ikki við býráðsarbeiði og persónlig viðurskifti hjá honum annars. Listin sær soleiðis út:

- Helena Dam á Neystabø
- Rigmor Dam
- Ann Damgaard
- Ingrid Henriksen
- Rebekka Vestergaard
- John Johannessen
- Heðin Mortensen
- Sjúrður Johannesen
- Jákup Danielsen
- Hilmar Augustinussen

Annar uppstillingarfundurin mánakvøldið varð niðurlagdur og verður uppafturtikin 1. juni. Tað merkir, at tá kunnu fleiri nøvn koma á listan. Tá annar uppstillingarfudnur hevur verið, kunnu fleiri nøvn ikki koma á lstan.

## Fakfeløg mótmæla Smyril Line



Feløgini í Samtak mótmæla harðliga, at Smyril Line av sínum eintingum velur at síggja burt frá sáttmálanum, sum altíð hava verið brúktir umborð á Norrønu. Feløgini í Samtak hava tí gjørt av ikki at brúka Norrønu til skeið og annað fakligt virksemi so leingi trætan við Sjómannadeild Føroya Fiskimannafelags stendur við. Feløgini kunna ikki góðtaka, at Smyril Line setur fólk umborð fyri minnið hýru enn sáttmálin við Sjómanndeild Føroya Fiskimannafelags ásetur, sigur Samtak í yvirlýsing.

Feløgini í Samtaki heita á Smyril Line um at broyta starvsviðurskiftini hjá nýggju starvsfólkunum, og at seta tey samsvarandi sáttmála millum Sjómannadeild Føroya Fiskimannafelags og Reiðarafelagið fyri farmaskip.

Feløgini í Samtaki eru:
Føroya Arbeiðarafelag
Havnar Arbeiðsmannafelag
Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag
Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag
Føroya Fiskimannafelag



**Samhaldsfesti fíggja veganet**

JOHN JOHANNESSEN
KJAK Á SÍÐU 19



**Løgtingið mist sambandið við fólkið**

EDMUND JOENSEN
KJAK Á SÍÐU 17

## Stanley og Stine í Ribarhúsi



Fríggjakvøldið klokkan 20 verður ein poetisk, ljómandi konsert í Ribarhúsi við Stine Michel og Stanley Samuelsen. Stine Michel er dóttir Peter Michel, sum fleiri ferðir hevur verið í Fuglafirði og sungið í kórinum Tritonus, sum John Høybye leiddi. Við hópinum er eisni Perry Stenbäck (Sv) spælir á gittar, nyckelharpu, dobro, harmoniku og oblg. rødd. Stine fer at syngja : "Frejas viser", sum er um eina kvinnu nú á døgum, sum hevur alsk til kettur og tann ásttikna kærleikan. Íblásturin er úr norðurlendsku gudalæruni um kærleikans gudinnuna, Freiu. Hetta verður forkunnungt at lýða á. - Stanley hevur júst fylt 60 ár, og hevur okkara bygdasonur givið fløgu út við 13 løgum við teksti, sum Gunnar Hoydal hevur týtt til danskt. Heitið á fløguni er: "Alle hjertets sange!" Ja, hjartaligur er hann, Stanley, í síni atferð sum menniskja og tónlistamaður. Hevur við sínum fingrasnippum spælt seg inn í alra føroyinga hjørtu. Nú, tey seksti árini eru farin í tíðarinnar hav, er glóðin í tónlistahuga Stanleys ljós livandi. Hesir tríggir fólkasangararnir fara at syngja saman og flætta saman eina poetiska gongd frá Freiu til løgini hjá Stanley og Perry Stenbäk. Stanley singur síni hjartaligu løg á føroyskum, skrivar Frits Johannesen úr Fuglafirði.

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo
**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo
**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814, aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo
***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*